VIÐMERKINGAR

# Størri ávirkan á uttanríkispolitiska økinum



VAL05

**Bergur Bærendsen**

Tíðin er komin, at vit taka egnar uttanríkispolitiskar avgerðir óavhengugt at Norðuratlantsbólkinum.

XA Valevni Fólkafloksins

# Vit ella tey



VAL05

**Hjørdis Viberg**
*Fólkaflokkurin*

Vit skulu hava ein sjálvberandi búskap, har familjan er kjarnan, og har vit sjálvi eru við í teimum avgerðum, sum tiknar verða.

# Lata hurðar upp



VAL05

**Rúna Sivertesen**

Okkara umboð skulu eisini vera fús at hjálpa einstaklingum. Fólkatingsumboð kunnu lata hurðar upp, sum annars eru ómøguligar at koma ígjøgnum.

XA Valevni Fólkafloksins

# Trygg okkara millum



VAL05

**Jógvan við Keldu**

Vit skulu hava føroyskan útlendingarpolitikk. Málið er, at útlendingar, sum búgva okkara millum, skulu kenna seg tryggar og skulu sanniliga ikki verða endaleyst tjakevni.

XA Valevni Fólkafloksins.

# ES gjøgnum bakdyrnar

**Niklái Petersen**
*Tjóðveldisflokkurin*



VAL05

Okkara tilknýtið til ES, hevur ofta verið havt á munni seinastu dagarnar. Danir skullu helst um ikki so langa tíð til at atkvøðu um ES-grundlógina, og í hesum liggur sjálvsagt okkara tilknýtið framyvir til ES og ríkisfelagsskapin. Hendan felags ES-grundlógin verður omanfyri tær nationalu grundlógir, sum eru galdandi í dag.

Danir hava fýra fyrivarni mótvegis ES í dag, tey eru: uttanríkismál, gjaldoyramál, hernaðarmál, og rættarmál.

Danir eru sostatt ávegis at leggja seg undir eina nýggja ES-grundlóg, tá fáa mynduleikarnir í Bruxelles eisini beinleiðis vald á okkara uttanríkismálum, gjaldoyramálum, hernaðarmálum og rættarmálum, uttan at vit yvirhøvur eru eftirspurd.

Tá fáa vit í Føroyum eitt álvarsamt demokratiskt undirskot, tí vit eru ikki limir í ES.

Fyri yvirhøvur at fáa limaskap í ES, mugu vit verða eitt sjálvstøðugt land, og hetta land nevnt Føroyar ræðast afturhaldsflokkarnir sum pestin. Sera løgið og óskiljandi at ræðast seg sjálvan so illa, at man nærmast rennur undan sær sjálvum.

Sum støðan er í løtuni, hevur onki ES-land sjálvstøðugan fiskivinnupolitikk, men hesin verður sentralt stýrdur beinleiðis úr Bruxelles, og er hetta ein av høvuðsorsøkunum til at lond, sum hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu, eru harðliga ímóti hesum felagsskapi.

Tað eru trupuleikar í dag, at stýra okkara fiskivinnu, og tað verður púrasta vónleyst at stýra henni úr Bruxelles, tað hugsi eg, allir føroyingar eru rættuliga samdir í.

Men vit skulu tó ikki renna undan ES, ES er komið fyri at verða, og vit mega taka dystin upp, og fáa sum mest burturúr.

Tjóðveldisflokkurin fer at halda eitt vakið eygað við og fer áhaldandi at nýta møguleikan við fólkatingssessinum at upplýsa føroyingar um hesi og onnur viðurskiftir føroyingum at gagni.

Vel so tað munar - vel góða røkt - vel Tjóðveldisflokkin- vel E.

# Dugir tú at lofta ?

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*

Tað er ein stór uppgáva, at røkja okkara sambond út í heim, sambandið við Danmark og samskiftið við hini Norðurlondini og við okkara nærmastu grannar. T.d. Stóra Bretland.

Føroyar eru tað land, sum hevur longsta felags mark við Stóra Bretland. Tí hava vit sjálsagt eisini nógv felags áhugamál. Tað eru ótaldir samstarvsmøguleikar, vinnumøguleikar, fiskivinnumøguleikar, handilsmøguleikar, granskingar- og útbúgvingarmøguleikar at røkja, bara her. Taka vit so Danmark, Norðurlond og partar av Evropu afturat, so er tað beinan vegin greitt, at vit tosa um eina ógvuliga stóra uppgávu.

Heldur enn at føra føroyskan tvídrátt millum tjóðveldi og samband niður á danating, til lítlan sóma fyri føroyingar, skulu okkara fólkatingsumboð lofta teimum møguleikum, sum altjóða leikpallurin bjóðar fram.



VAL05

Henda uppgáva kemur afturat dagligu gongdini á Christiansborg.

# Arbeiðsloysi á tingi

**Hergeir Nielsen**
*1. næstformaður*



VAL05

Løgtingsformaðurin hevur gjørt eina stytri og eina longri dagsskrá. Tann fyrra fevnir um morgindagin, tá eitt uppskot frá landsstýrinum og tvey frá sjálvstýriflokkinum koma fyri.

Seinna skráin fevnir um eitt lógarmál, tveir fyrispurningar og tvey mál frá Norðurlandaráðnum. Síðani er slætt borð.

Seinna skráin liggur aftan á fólkatingsvalið, og løgtingsformaðurin hevur kunnað almenningin um, at hesi mál órógva politiska húsfriðin so mikið, at hann saman við umsiting síni hevur kolldømt hesi mál eina tíð fram.

Talan er um nøkur áhugaverd mál frá tjóðveldisflokkinum, og tey hava als einki við fólkatingið at gera.

Í staðin fyri setur formaðurin á skrá tvey mál hjá stuðulsflokki sínum - har annað teirra viðvíkur sjálvum fólkatingsvalinum og júst elvir til, at valfepur tekur seg upp.

Hildið verður ikki, at formaðurin er óheftur í virki sínum, tá hann skilar sær rætt til at døma eitt lógarmál um ein almennan skrivstovubygning í Suðuroy, ein fyrispurning um bróstkrabba, og ein fyrispurning um umboðsmannin til at vera agitatiónsmál til fólkatingsvalið.

Stak undranarvert er harafturat, at í fráboðanin frá løgtingsformanninum verður eisini sagt, at umsitingin hevur arbeitt nógv við spurninginum um, hvat borðbært er á tingi í hesum døgum.

Starvsfólkið á løgtingsskrivstovuni verður drigið inn í eina politiska meting av uppskotum okkara, sigur formaðurin, og hesi starvsfólk taka so avgerðir oman fyri høvdið á fólkavaldu tingmanningini, skilja vit formannin rætt

Vit, sum eiga málini, eru ikki kunnaði um, at okkara skrivstova hevur arbeitt við eini tílíkari politiskari viðgerð av okkara málum og undrast yvir, hví so er.

Tað eru hóast alt okkara mál, og siðiligast, sakligast og sømuligast var tá, um vit eisini vóru partur av eini málsviðgerð um víðari lagnuna í hesum málum.

Vit kunnu sjálvandi saktans liva við, at málini verða viðgjørd leys av einum folkatingsvali, tí tey hava einki við tað at gera, men vit kunna illa livað við, at formaðurin og umsitingin flokka okkara mál øðrvísi enn onnur mál.

Øll vita vit, at álvarsligt arbeiðsloysi hevur rakt løgtingið. Tingmenn vóru sendir til hús 17. des 2004 og hildu frí til 19. januar 2005. Tá teir komu saman aftur, vóru bara nakrir fyrispurningar frá okkum í andstøðuni at takast við.

Hyggja vit eftir, hvat liggur fyri framman, so finna vit bara hetta eina lógarmálið frá mær sjálvum, tveir skrivligir fyrispurningar frá tveimum floksfeløgum mínum, og síðani er slætt borð.

Vísandi til hesa arbeiðsbyrðu sigur løgtingsformaðurin, at hann hevði hildið fleiri fundir, men valdi heldur, at tálmað agitatiónini til fólkatingsvalið.

Veruleikin er, at har er ikki annað at takast við.